Starv

krivstovu lk

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Strandfaraskipum Landsins er at hækka tænastu- og góðskustøðið innan fólkaflutningin. Í hesum sambandi verður søkt eftir skrivstovufólki (M/K) til fólkaflutningsdeildina – Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir.

Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður kann byrja skjótast gjørligt.

g vurnar j lka lutnings il ini
Fólkaflutningsdeildin skal veita eina úrslitagóða fyrisiting innan fólkaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan fólka- og akfarsflutningin hjá fyritøkuni.

Virksemið á deildini fevnir um hesar høvuðsfunktiónir:
- Planlegging
- Rakstur (skip og bussar)
- Ferðslusamskipan
- Ferðaseðlasamskipan

g vur j t i s tt ur v r ur
Uppgávur hjá skrivstovufólkinum verða m.a. at taka sær av:
- Avrokningum til privatu arbeiðstakararnar
- Elektronisku skúlakortunum
- At avlesa modulir til Buscom-skipanina
- Skaðafrágreiðinum v.m.
- Fyrifallandi uppgávum á skrivstovuni
- Vanligari kundavgreiðslu

Førl ikakrøv
- Góðan tænastuhugburð
- Góðan edv-kunnleika
- Málrættaður
- Góðan røkjuskap
- Góð samstarvsevni
- Fyrimunur er um tann, ið settur verður hevur royndir og kunnleika innan bókhaldsskipanina Navision
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum.

tanartr ytir
Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

s knir
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2002.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Guðrið Ellefsen, á tlf. 34 30 00 ella á e-post: gue@ssl.fo.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

an ssjúkra úsi
Fo 100 Tórshavn

júkrasystrar til

Hesi størv á eru leys at søkja:

- fast starv á starvsbrøki 0,7 í blandaðum vaktum frá 1. mai, ella eftir avtalu
- avloysarastarv á starvsbrøki 0,7 í blandaðum vaktum frá 1. mai til og við 28. februar 2003
- avloysarastarv á starvsbrøki 0,7 í blandaðum vaktum frá 1. september til og við 30. apríl 2003

Deildin tekur ímóti innkallaðum og akuttum sjúklingum. Hon hevur 18 seingjarpláss og hevur hesar sergreinar:

- gastroenerologi
- neurologi
- endokrinologi
- onkologi
- hæmatologi

Arbeitt verður eftir kontaktpersónsskipanini.

Deildarsjúkrasystirin hevur við tilvísing til yvirsjúkrasystrina á med. deplinum ábyrgdina av sjúkrarøktini, starvsfólkaleiðslu, tí fíggjarliga og menning av deildini..

røv til u søkjaran
- prógv og góðkenning sum sjúkrasystir
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni

it kunnu bj a
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu (introduktión)

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Ásu Poulsen, yvirsjúkrasystir, lokal 300 ella e-post asap@ahs.fo

tanartr ytir
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknarfreistin er 12. apríl 2002 kl. 12.00.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skivliga umsókn við avriti av prógvum, autorisatión og viðmælum til:

an ssjúkra úsi
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Brandt
Blomberg
Hvítvørur til føroyska húsarhaldið
Turkitrumla
5 kg av klæðum
Tíðarstýrd til lágan og høgan tempereatur

prísur fyrr 5.395,-
Nú 4.795,-
pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

júkrasystrastørv l ys at søkja gargar i

Talan er um eitt **sjúkrasystrastarv sum kvøl vakt** á Miðstovu lønarbrøk 0,5 ella 0,7 og sjúkrasystrar annars í skiftandi vaktir, til setan eftir nærri avtalu.

Størvini eru lønt sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Meira fæst at vita um størvini við at ringja 316788.

Skrivligar umsóknir við prógvum, skulu sendast til:

Leiðaran fyri

Stoffalág 84
Box 1188
110 Tórshavn

Umsóknarfreistin er til 15. apríl 2002.

Lágargarður

rsa al un ur

Lýst verður til ársaðalfund í Fylking leygardagin 13. apríl kl. 15.00.

Skrá sambært lóg felagsins.

vn in

Sosialurin -har tað hendir

Bilar

Nr. 60 • mikudagur • 27. mars 2002 • 76. árg.

Ketner skeið á Tekniska Skúla

Týskvøldið 12 og mikukvøldið 13 mars, høvdu umboð frá donsku fyritøkuni, Axel Ketner A/S, ið m.a. selja autoelektriska útgerð til bilkverkstøð, eitt evniskvøld á bildeildini á Tekniska Skúla í Havn. Høvuðsevnið hesi kvøldini var OBD og EOBD, ið er ein skipan sum sigur frá um bilarnir dálka ov nógv.

EVNISKVØLD
Magnus Gunnarsson

Trý umboð frá donsku Ketner fyritøkuni vóru her og sýndu fram tað nýggjasta innan útgerð til at finna brek í bilunum, sum gera at teir dálka meira enn teir eiga. Endamálið við OBD (On Bord Diagnosis) og EOBD (Europæisk On Board Diagnosis) er til dømis eitt støðugt eftirlit við øllum komponentum, ið kunnu ávirka dálkingina úr útstoytinum, skráseting av brekum, sum hava við útstoytsgassið at gera, goymsla av upplýsingum um brek, sum koma fyri, og møguleikan at fyri at avlesa goymd brek.

Onnur útgerð

Eisini varð útgerð sýnd fram, ið verður brúkt til onnur endamál, eitt nú til at finna brek í elektriska kervinum, sum til dømis í ABS, EDS og ESB bremsuskipanum, eisini hentleikaskipanum, so sum sentrallásum, el-rútavindarum, tjóvaríalarmum o.a. ið er ávirkað av dataskipanini, ið kallast CAN-Bus.

OBD EOBD og MIL

Amerikanska OBD skipanin, ið kom í gildi fyrst í 90-árunum, og evropeiska skipanin, EOBD, skulu skiljast sum diagnosuskipanir, ið eru innbygdar í bilin, til at ansa eftir at tær skipanir sum avmarka útlátið, og harvið umhvørvið, virka sum tær skula. EOBD kravið sigur, at allir bilar skulu vera útgjørdir við MIL (Malfunction Indicator Light), ið er ein gul lampa, sum sigur frá um brek er í skipanini. Skipanin ansar t.d. eftir katalysatorinum, luftslanguni til bensintangan og motorgongdini.

Strong krøv

Orsakað av tí alsamt vaksandi dálkingini verða sera strong krøv sett til bilverksmiðjurnar og harvið eisini til tey, sum skulu umvæla bilarnar. Arbeiði sum bilmekanikari er ómetaliga nógv broytt tey seinnu árini. Umframt tað at bilmekanikarar ofta eru uttanlanda á skeiði, innan tað nýggjasta sum kemur fram innan teirra egnu bilmerkir, verða við jøvnum millumbilum hildin skeið í Føroyum. Tá er tað ofta bildeildin á Tekniska Skúla sum skipar fyri hesum skeiðum. Fyriskiparar á hesum skeiðinum vóru, Eirikur Ólason Simonsen og Bergur Danielsen, lærarar á bildeildini á skúlanum.

Áhugin var stórur fyri hesum skeiði. Her eru nakrir av skeiðluttakarunum, frá vinstru: Torberg Johannesen, Eyðun Johansen, Ole Bjerg frá Ketner, Ívar Ellendersen, Leivur Torvadal, Hendrik Weihe og Heri Guttesen

Trý umboð frá donsku fyritøkuni, Aksel Ketner A/S, sýndu fram tað nýggjasta innan útgerð til at finna brek í bilunum. Teir eru frá vinstru, Ole Bjerg, tekniskur stjóri, Dan Busch-Møller, produktleiðari og Jan Thy sølukonsulentur

Tíðindaskrivið Ellisakfør er nú at fáa á Shellstøðunum kring landið

Shell Støðin á Frælsinum

Shell Støðin við Streymin

Shell Støðin á Sandi Sandur

Shell Støðin v/ Mogens Petersen Trongisvágur

Shell Støðin Norðari Ringvegur

Shell Støðin í Gøtudali

Myllan v/ Jógvan H. Joensen Miðvágur

Shell Støðin Vestmanna

Shell Quick Service Klaksvík

Shell Støðin á Oyri Vágur